# Dagny listaframsýning

**Leygardagin læt listaframsýning upp á Norðoya Kunningarstovu. Tað er 50 ára gamla, Dagny Tróndheim úr Klaksvík, sum sýnir fram**

LISTAFRAMSÝNING
*Rúna Sivertsen*



*Í hesum døgum sýnir Dagny Tróndheim 20 málningar fram á Kunningarstovuni í Klaksvík. Framsýningin, sum er bæði fjølbroytt og áhugaverd, verður opin henda mánaðan út*
*(Mynd: Rúna Sivertsen)*

Flestu av verkunum hjá Dagny Tróndheim eru løtu- og hugnamyndir. Tað, sum eyðkennir myndirnar hjá henni er stemningurin, sum hon hevur serstakliga gott hegni at lofta.

Frá barni av hevur hon teknað og málað, og hevur fyrr sýnt fram saman við øðrum listakvinnum úr Klaksvík. Eftir ein steðg í nøkur ár, er hon nú rættiliga byrjað av nýggjum, og er hetta hennara fyrsta sjálvstøðuga framsýning.

## Hugnamyndir

Málningarnir eru 20 í tali, flestu teirra akrylmálningar, men eisini onkur aplikerað mynd er at finna millum listaverkini. Myndirnar eru fjølbroyttar við bæði summar- og vetrarmyndum umframt uppstillingum.

Millum myndirnar eru eisini tvær, sum dóttir Dagny, 22 ára gamla Astrid, hevur málað.

Í Klaksvík finnast nógv listafólk, og fleiri teirra sýna javnan fram verk síni. Í løtuni sýnir Magna Auðunson fram í Leikalund, so tey, ið hava áhuga fyri list, kunnu leita sær til Klaksvíkar at síggja mongu frálíka vøkru myndirnar, Dagny og Magna sýna fram.

Báðar framsýningarnar halda fram henda mánaðan út.

Fyri at venda aftur til Dagny, kunnu vit siga, at hon gift Gerhardi Tróndheim og eiga tey 5 børn. Nú húsið er vorðið lættari og reiðrið tømist, ætlar Dagny at gera meiri við myndalistina.

## Kvinnurnar gera seg galdandi

Tað eru serstakliga kvinnurnar norðanfyri, sum gera seg galdandi innan listina. Fyri stuttum sýndi Lydia Petersen, sum ikki er heilt ókend listakvinna, fram nakað av sínum verkum á Kunningarstovuni.

Og kanska er nakað um tað, sum onkur skemtandi helt fyri ein dagin herfyri - at triðja hvør kona í Klaksvík er vorðin listakvinna.

Í hvussu er og ikki, so gleða vit okkum at síggja, hvat hesar og teir, ið fáast við list, í framtíðini fara at bjóða okkum.

J. Broncksgøta 35 | P. O. Box 370 | FO-110 Tórshavn
tlf 34 59 60 | fax 34 59 52 | T-postur: cargo@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

Jón Rói flytur við
SMYRIL LINE



SMYRIL LINE

†

Kunngjørt verður ætt og vinum at elskaði maður, pápi, abbi og verfaðir

**Sofus Andreas Hansen**
(nevndur Andras)
Saltangará

andaðist á landssjúkrahúsinum, leygardagin 9. august, 71 ára gamal.

Kistan verður í Glyvrar kirkju týsdagin 12. august kl. 18.00.
Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Signhild**

**Sólvá, Anna, Arnhild, Petur Chr. og Signar v/ fam.**

## *Tøkk*

*Hjartaliga takki eg tykkum, um mintust meg á 75 ára føðingardegnum. Ein serstøk tøkk til tey, sum gjørdu mær dagin ógloymandi.*

***Heilsan***
***Palli Dalsgaard***



# Landsstýrismálanevndin yvirmetir seg sjálva



*Landsstýrismálanevndin er ikki nakar dómstólur, men tað hevur nevndin eftir øllum at døma gloymt í sambandi við Jógvan S málið.*

**Landsstýrismálanevndin yvirmetir seg sjálva og sína uppgávu, tá hon ger juridiskar niðurstøður sum hana, ið gjørd varð í Jógvan S málinum. - Nevndin skal halda seg til at gera politiskar niðurstøður og ikki kamuflera tær við jura, heldur ein av arkitektunum handan stýrisskipanarlógina**

POLITISKT JURA
*Rúnar Reistrup*

- Landsstýrismálanevndin skal vegna løgtingið halda eftirlit við um landsstýrismenn útinna sítt starv á lógligan hátt. Men nevndin er politisk, og tað er tískil ikki uppgávan hjá nevndini at gera juridiskar niðurstøður og spæla eitt slag av yvirdómstóli omanfyri bæði løgtingi og landsstýri, soleiðis sum hon hevur gjørt í málinum um veiðiloyvið hjá Jógvan S., sigur løgfrøðingurin Annfinn V. Hansen, sum var við til at smíða stýrisskipanarlógina. Við síni niðurstøðu um, at avgerðin hjá Fiskimálaráðnum at geva reiðarínum S/pf Nakki, sum eigur Jógvan S., tilsøgn um samanlegging av fiskiloyvum, var ólóglig, er landsstýrismálanevndin sambært løgfrøðinginum farin út á djúpt vatn, har jura og politikkur verða blandað saman.

- Niðurstøðan hjá landsstýrismálanevndini er politisk, men verður kamuflerað við jura. Tað er villleiðandi, tí harvið leggur nevndin tað út sum at hennara avgerð er endalig og tann einasta rætta. Tað letur í hesum førinum til, at landsstýrismálanevndin sær seg sjálva meira sum ein dómstól heldur enn sum ta politiska nevnd, hon í veruleikanum er.

## Ikki døma

Leikluturin sum dómstólur var ongantíð ætlaður landsstýrismálanevndini, sum upprunaliga var hugsað inn í stýrisskipanarlógina sum ein møguleiki hjá løgtinginum at hava eftirlit við arbeiði landsstýrismanna.

- Landsstýrismenninir fingu stórt vald við stýrisskipanarlógini, og tí varð hildið, at tað var rætt at hava eina løgtingsnevnd, sum áhaldandi kundi halda eyga við, um alt fór rætt fram í almennu umsitingini, sigur Annfinn V. Hansen.

Men eitt er at halda eyga við og meta um, eitt annað er at døma. Og tað skuldi nevndin ikki. Í Stýrisskipanarlógini stendur um Landsstýrismálanevndina, at »Hevur nevndin illgruna um, at óregluliga hevur verið atborið, kann hon krevja, at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra sum ikki hevur dómsmyndugleika«.

Tað liggur soleiðis í orðingini, at landsstýrismálanevndin skal halda seg til eftirlitsskylduna og lata arbeiðið at gera juridiskar niðurstøður í hendurnar á uttanveltaðum løgfrøðingum.

Harvið er ikki sagt, at nevndin ikki kann gera metingar og niðurstøður, men tær skulu vera av politiskum heldur enn juridiskum slag.

- Eitt mál skal vera ógvuliga greitt lýst, áðrenn ein politisk eftirlitsnevnd brúkar eitt orð sum »ólógligt« í niðurstøðu síni. Tá eitt nú løgtingsins umboðsmaður ger sínar niðurstøður, er málburðurin ofta ikki so kontantur. Hann brúkar heldur »átaluvert« ella »illgrunasamt«, og landsstýrismálanevndin átti at orðað sínar niðurstøður eftir nøkulunda sama leisti, sigur Annfinn V. Hansen.

## Skeivt frá byrjan

Løgfrøðingurin heldur, at landsstýrismálanevndin heilt frá byrjan gjørdi skeivt í málinum um tilsøgnina um fiskiloyvið hjá Jógvan S.

- Landsstýrismálanevndin skuldi ikki havt tikið eitt einsamalt mál upp soleiðis, sum hon hevur gjørt, men átti heldur at tikið sjálvan umsitingarháttin upp til viðgerðar. Tí um tað er rætt, sum Fikimálaráðið sigur, at 32 onnur loyvi vóru givin eftir somu mannagongd, so er tað ikki uppgávan hjá landsstýrismálanevndini at taka eitt mál burturúr rúgvuni og kanna tað, men at kanna um vanligi umsitingarhátturin er í tráð við lógina og politiska viljan.

Landsstýrismálanevndin gjørdi beint øvugt. Í viðgerðini av Jógvan S. málinum helt nevndin seg beinleiðis frá at viðgera og meta um vanliga umsitingarháttin í sambandi við samanlegging av veiðiloyvum.

## Drigið borgara uppí spælið

At landsstýrismálanevndin valdi at taka eitt einsamalt mál upp og viðgera tað heldur enn umsitingarháttin, hevur sambært Annfinni V. Hansen havt tað óhepnu fylgju, at ein einstakur borgari er drigin uppí politiska spælið og hevur fingið negativa serviðgerð.

Í umbidnu frágreiðing síni til Fiskimálaráðið um Jógvan S málið, skrivar Halgir Winther Poulsen, advokatur, at "Hevði landsstýrismálanevndin havt nýtt møguleikarnar í starvsskipan sínari um at málið átti at verið lagt fyri rættin ella víst málinum til løgtingsins umboðsmann [...] hevði verið sloppið undan, at eitt mál millum umsitingina og ávísan borgara gjørdist partur av politiskum ósemjum við harav fylgjandi undangraving av rættartrygd borgarans".